**Føðingar**
10. mai fingu Birita og Róði Midjord, Froðba, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3950 gr.

16. mai fingu Birna Heinesen, Hoyvík og Hans Jákup Danielsen, Strendur, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4160 gr.

18. mai fekk Hildur Hansen, Havn, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3500 gr.

18. mai fingu Gerd Jeonhardsen og Henning Rindheim, Fuglafjørður, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3800 gr.

18. mai fingu Marianna B. og Finn Hansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3200 gr.

19. mai fingu Maren Johansen og Uni Svabo Joensen, Miðvágur, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 2900 gr.

19. mai fingu Simona B. og Jóannes Poulsen, Fuglafjørður, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 3850 gr.

20. mai fingu Elisabeth Hentze og Hans Albert Hansen, Hoyvík, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3850 gr.

21. mai fingu Annika og Regin Frederiksberg, Saltangará, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4600 gr.

22. mai fingu Maiken Lind og Poul Helgi Jacobsen, Nes, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4200 gr.

23. mai fingu Súsanna og Sjúrður Skaale, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3300 gr.

24. mai fingu Heidi Haraldsen og Bjarni Prior, Miðvágur, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3800 gr.

27. mai fingu Anngerð Knudsen og Petur Kyed Jensen, Keypmannahavn, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3824 gr.

**Prógv**

Knud Nedergaard-Hansen hevur 18. mai 2006 lokið prógv sum civ.ing. (cand.polyt) innan framleiðslu og leiðslu á DTU í Keypmannahavn

Sum fyrsti føroyingur hevur Petur Elias Ellefsen tikið prógv sum Professions Bachelor í Visuel kommunikation frá Højer College.

**Brúdleyp**
Leygardagin 27. mai giftast Vanja Ejdesgaard Bech, Lopra og Svein Petersen, Hvalba. Vígslan verður í Vitninum í Hvalba kl. 15.00. Dagurin verður hildin fyri innbodnum.

Leygardagin 27. mai kl. 14.30 giftast í Osted Missionskirke Arnstein Niclasen, Århus og Benedikte Højgaard Jensen, Osted. Brúdleypsadr.: Langtved Færgekro, Munkholmsvej 138, 4060 Kirke Såby

**Dagurin**

**27. mai. Lucianus**, deyður umleið ár 200. Saman við fleiri øðrum tikin av døgum um Svartahavsleiðina. Kristian Osvald Viderø varð føddur hendan dagin í 1906

**28. mai. Vilhjálmur**, deyður í 812. Hertogi í Gascogne í Fraklandi. Var ein av kempunum hjá Karlamagnusi keisara. Tað er um hann, at Sjóvarbóndin yrkti kvæðið Viljorm Kornus. Hann fór í kleystrið inn at bøta sínar syndir. Seinni legði hann út aftur í herstríð, men halgisøgan sigur, at hann á gamalsaldri aftur fór í kleystrið, sum hann sjálvur hevði grundað. Upprunaliga týskt navn, vilji og hjálmur.

**29. mai. Maximinus**, deyður í 352. Biskupur í Trier í Fraklandi. Á ferð til Miklagarðs at royna semju í kirkjuligum stríði doyði hann.

# Minningarorð um mína elskaðu ommu Brynhild Solveig Hansen

## fødd 28. desember 1921 andaðist 8. apríl 2006

Leygarmorgunin 8. apríl fekk eg tey tungu boðini, at mín elskaða omma var farin.

Eg var sjálvsagt gott klár yvir, at omma ikki var heilt ung longur, og at hon ikki hevði havt tað so gott ta seinastu tíðina. Men at eg skuldi missa hana nú, kom heilt óvart á meg.

Seinast eg sá ommu var nýggjársmorgun, áðrenn eg fór við flúgvaranum aftur til Danmarkar eftir jólafrítíðina, og hóast vit fáar dagar frammanundan høvdu hildið hennara 84 ára føðingardag, vardi tað meg ikki, at hettar var síðstu ferð, eg skuldi síggja ommu á lívi. Hon var hendan morgunin frísk og væl uppløgd, gekk og trippaði runt um meg, spurdi um eg nú hevði minst til alt, um eg hevði fingið nokk av fiski við, um eg ikki vildi hava ein bita, áðrenn eg fór og gav mær eitt par av ullintum hosum, sum hon sjálv hevði bundið og bað Gud geva mær heilsuna at slíta tær. Men sjálvt um hon gekk soleiðis og hjálpti mær við at blíva ferðaklár, visti eg eisini væl, at tað var við tungum hjarta, at hon gjørdi tað, og at hon ynskti, at eg ikki skuldi avstað aftur longu.

Eitt tað besta omma visti, var at fáa meg heim í feriu, og eitt tað besta eg visti, var at koma heim og síggja hana standa stórsmílandi í túninum og bíða til eg kom oman av flogvøllinum og fáa eitt stórt klemm og ein muss á kjálkan frá henni. Tí var tað eisini við einari serstakliga tómari kenslu, at eg kom heim til jarðarferðina, og fyri fyrstu ferð upplivdi, at ongin omma stóð stórsmílandi í túninum og tók ímóti mær við opnum armum. Og serliga tungt er tað at hugsa um, at eg ongantíð skal uppliva hennara gleði aftur og ongantíð fáa eitt klemm og ein muss frá henni aftur.

Eg og omma hava altíð havt eitt ótrúliga tætt forhold, og omma hevur altíð verið nakað heilt serligt fyri meg. Eg havi stórt sæð alt mítt lív búð hjá ommu og abba, og eingin kundi hugsa sær eitt tryggari heim og ein betri uppvøkstur, enn eg havi havt. Sjálvt um omma og abbi vóru rættuliga gomul, tá eg bleiv fødd og kom í húsið hjá teimum, tóku tey ímóti mær við opnum ørmum og hjørtum. Eg eri gott klár yvir, at tað til tíðir má hava verið strævið hjá ommu, at hava havt ein nýføðing at taka sær av, og kanska ikki minni strævið, tá eg



bleiv tannáringur. Men ongantíð hevur omma klaga (gramt seg) um nakað, eg havi, um ein kann siga so, aldrin følt meg sum eina byrðu, men meira sum eitt ynskibarn og altíð fingið allan tann kærleika og alla ta umsorgan, sum eitt barn kann ynskja sær og hevur brúk fyri, fyri at trívast, hava tað gott og føla seg trygt. Og serliga tryggleikin hevur verið stórur. Eg minnist meg ongantíð at hava verið komna heim í eitt tómt hús. Frá morgun til kvøld var omma til staðar. Hvønn morgun kom hon upp við mær og syrgdi fyri, at eg kom í skúla, og áðrenn eg fór út gjøgnum hurðina, signaði hon meg og so góvu vit hvørja aðrari ein muss á kjálkan. Og tá dagurin var liðugur, og eg skuldi í song, var tað so deiligt at sleppa inn at sova ímillum hjá ommu og abba. Har lærdu tey bæði meg at biðja faðir vár, og aftaná at omma hevði signað meg, plagdu hon og abbi at lesa eina søgu fyri mær, ella sjálvi finna uppá onkra. Og var eg stadigvekk ikki sovnaðtá søgan var liðug, plagdi omma at syngja »Eg veit ein góðan seyðamann« fyri mær, meðan hon lá og kýndi mær um ryggin.

Alt hettar er sjálvandi ein farin tíð, og eg eri blivin vaksin nú, men minnini vil eg altíð hava við mær, og tey hava verið og eru ein góð barlast at hava við á víðari ferð í lívinum. Og eitt er so heilt vist, eg havi onki annað enn góð minnir um ommu, og tað sama veit eg er galdandi fyri øll hini í familjuni og í heila tikið fyri øll, sum kendu hana. Ongin sum nakrantíð hevur møtt ommu, kundi annað enn vera góður við hana og minnast henni alt gott. Tað er so ótrúliga rámandi, sum Margar Toftegaard lýsti ommu til jarðarferðina. Hann kallaði hana fyri »tann lítla konan við tí stóra hjartanum«. Og tað var akkurát hennara stóra hjarta og stóri kærleiki til øll síni medmenniskju og serliga familjuna, sum gjørdi, at hon var so nemm at vera góð við. Hon var altíð blíð at koma inn til hjá fólki og var beinanvegin klár við einum kaffimunni og onkrum góðum afturvið. Og tolin var hon sum tey fægstu. Vit hava eina stóra familju og ofta komu nógv inn á gólvið samstundis, og tað kundi blíva nógvur larmur. Men hon klagaði ikki um larmin og skeldaði ongan. Hon var bara glað fyri at fáa síni kæru inn á gólvið til eina og hvørja tíð. Og hartil hevði omma eina lívsgleði og lívsstyrki sum ongin annar, eg kenni. Omma hevur havt nógvar stórar sorgir í sínum lívi. Hon hevur mist fýra børn og mannin hjá sær, men hóast tað, misti hon ongantíð gleðina við lívinum. Hon var altíð klár at ugga okkum onnur, ið høvdu mist, hóast hon sjálvt hevði mist líka nógv sum vit. Tí følist tað eisini so serliga tungt nú at hava mist ommu. Nú havi eg ikki hana longur at lena meg afturat, tá lívið er tungt og keðiligt, og tað er tað nemliga í hesi løtu. Eg og restin av familjuni hava mist nakað so ómetaliga dýrabart í okkara lívi. Tað er so satt sum tað verður sagt, at tann, sum eigur nógv, hevur nógv at missa, og hevur nakar átt nógv, so eru tað vit øll, sum hava havt gleðina av at kenna og vera elskaði av ommu ígjøgnum alt okkara lív. Omma hevur verið ein so ótrúliga stór og góð gáva fyri okkum øll, at tað er ringt at seta orð á tað. Tilsvarandi er tað eisini ringt at seta orð á ta stóru sorg og tað stóra tómrúmið, sum vit sita eftir við nú, ið hon er farin herfrá. Eg vildi so gjarna havt hana her á jørð hjá mær altíð; vildi so gjarna ynskt, at eg kundi uppliva lívsins gleðir saman við henni, og at hon kundi uppliva meg blíva útlærda í summar. Men soleiðis skuldi tað ikki vera. Nú hevur omma fingið frið og er farin heim til Faðirin í himmalinum og heim til øll tey, sum hon hevur mist og hevur longst so innarliga eftir. Ein dag skal eisini eg møta ommu aftur, og til ta tíð vil hon liva víðari í mínum hjarta og upp á tann hátt vera við mær í øllum mínum gleðum og sorgum í lívinum. Friður verið yvir minninum um mína elskaðu ommu.

**Ommudótturin Janna**

# Ein tøkk til Janus Mohr, útvarpsmann



*Johs. Andr. Næs*

Ein tíð er nú liðin, síðan eg varnaðist, at Janus Mohr var hildin uppat at arbeiða í Útvarpi Føroya. Tað kennist saknur í Janusi.

Soleiðis var eisini, tá ið Ívar Iversen fór. Tað var ein fløvi við røddum teirra, og innihaldið varð borið fram so natúrliga, sum sótu teir í stovuni saman við tær, sjálvt um evnini, teir arbeiddu við, vóru eitt sindur ymisk. Tað fløvaði nú fyri stuttum at hoyra Ívar siga frá barnaárum sínum.

Janus hevur ikki verið so lítið av einum »pioneri« í Útvarpinum hesi 20-30 árini, hann hevur arbeitt har – tey fyrstu árini í frítíð síni, áðrenn hann varð settur í fast starv. Tann gløggi stjórin Niels Juel Arge sá, hvar Janus hevði síni evni og sín áhuga. Og eftir tí mynstri varð Janus settur í starv. Nú var frítíð arbeiði og arbeiði frítíð hjá Janusi. Soleiðis gekk Janus upp í sínar sendingar og sítt arbeiði. Ein fyrimynd hjá mongum.

Sendingarnar hjá Janusi Mohr vóru altíð gjølla fyrireikaðar, og Janus dugdi væl at fáa dugandi fólk at samarbeiða við seg um tað, sum teimum var hugur á. Hann kendi fólk um alt landið, og sjálvur var hann væl kendur.

Í sendingum sínum fevndi Janus um musikk, um sang og sálmar. Tær vóru andligar og mentunarligar: Morgunandaktir hvønn morgun, sálmar og sangir hvørja viku, gudstænastur hvønn halgidag, tað heilaga evangeliið hvørt leygarkvøld og føroyskir sangir hvønn sunnudag kl. 13.40.

Janus Mohr hevði ein týdningarmiklan ans fyri miðvíst at taka upp og varðveita okkara sálma- og sangskatt, so at tú úr hesum keldum kanst taka fram tað, sum tær nýtist í sambandi við tað evni, tú viðger á hesum øki. Og tað er næstan ikki tað lag – ið hvussu er í sálmabókini – sum Janus ikki sjálvur dugir, og hann hevur tí verið til stóra hjálp hjá teimum, hann samarbeiddi við um sendingar.

Sendingarnar hjá Janusi eru teirra millum, sum fólk flest lurta eftir. Hesa ábyrgd hevði Janus, og hann røkti hana væl. Eitt dømi lýsir hetta. Ein húsmóðir við fullari stovu av fólki ein sunnudag kl. 13.40 sigur hart við myndugleika: »Nú tiga tit, tí nú kemur Janus!«

Ein av teimum góðu álitismonnum er farin úr Útvarpinum. Vit eru mong í landinum, sum bera Janusi Mohr bestu takk fyri gott og trúfast arbeiði.